| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>5. november 2009 | Blað nr.:<br>**8149** |
| --- | --- |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **5. november 2009** **kl. 17.00**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 204/09-223/09**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Rúni M. Djurhuus
Halla Samuelsen
Jákup Símun Simonsen
Maria Hammer Olsen
Annfinn Brekkstein
Inga Dahl
Levi Mørk
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU IKKI:**
Elin Lindenskov, sum hevur biðið um farloyvi
Vagnur Johannesen, sum hevu biðið um farloyvi

**LUTTÓK EISINI:**
Jákup E. Hansen
Bjørgfríð Ludvig

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00**

**205/09** **2009-1366**

**Elin Lindenskov hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Rúni M. Djurhuus, eru loknar.

**Býráðið 5. november 2009:** Samtykt.

**206/09** **2009-1366**

**Vagnur Johannesen hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Inga Dahl, eru loknar.

**Býráðið 5. november 2009:** Samtykt.

**207/09** **2008-1199**

**Endurskoðan av sáttmálanum við Fa. Bussferðir v/Hildur Jensdóttir.**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Hildur Jensdóttir hevur gjørt vart við at sáttmálin, ið gjørdur var millum táverandi Velbastaðar kommunu og Fa. Bussferðir, eigur at verða endurskoðaður. Víst verður á, at fíggjarligu viðurskiftini ikki eru nøktandi – hetta tí tímaprísurin í sáttmálanum fyri busskoyring er ov lágur. Hildur Jensdóttir hevur á fundum við umsitingina harumframt greitt frá, at túratalið og farleiðirnar eru munandi víðkað í mun til tað, sum sáttmálin upprunaliga legði upp fyri.

Sambært § 2, stk. 2 í sáttmálanum millum kommununa og Bussferðir frá 23. des. 2003 framgongur, at verða fortreytirnar fyri farleiðina munandi broyttar í sáttmálatíðini, t.d. at talið á ferðandi veksur so nógv, at tørvur verður á íløgu í buss/bussar, kann sáttmálin verða tikin upp til samráðingar.

Í § 6 stendur sáttmálin við, til hann av øðrum partinum verður sagdur upp skrivliga við 3 mánaðarliga ávarðing til tann 1. í einum mánaða. Í somu grein stendur eisini, at sáttmálin ikki kann fara úr gildi fyrr enn tann 1. juli 2010.

Grundað á omanfyri standandi hevur Hildur Jensdóttir víst á, at ynski er at samráðast við kommununa um at endurskoða verandi sáttmála.

Sum støðan er í dag, er væntandi at fleiri fara at nýta farleiðina. Tað finnast eingi heilt ítøkilig ferðafólkatøl, men vitandi um at fleiri fólk er flutt til Velbastað, og nógv fleiri børn nú ganga í skúlanum, má roknast við at enn fleiri fara at brúka farleiðina Tó kann staðfestast, at busskoyringin er økt munandi, og í hesum sambandi eru ynski frá m.ø. staðbundnu nevndini um at økja um túratalið. Víst verður í hesum sambandi til mál nr. 2005-0416 Mál viðv. Bussleiðini.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Árligi kostnaðurin fyri skúlabarnakoyring til Velbastað er uml. kr. 450.000,-, ið verður fíggjað av konto 18-5950. Samlaði árligi kostnaðurin fyri skúlabarnakoyring í Tórshavnar kommuna er kr. 2.237.543,-.

Og árligi kostnaðurin fyri býbusskoyring til Velbastað er uml. kr. 879.620,-.

Í verandi sáttmála er tímaprísurin kr. 289,- og henda upphædd er ikki lønandi fyri arbeiðstakaran. Kommunan letur uml. kr. 400-600,- um tíman fyri busskoyring í bussleiðini.

Ì tí nýggja sáttmálanum, sum er komin frá Fa. Bussferðir, er tímataksturin 475,- um tíman.

Umsitingin hevur biðið um uppskot um endurskoðaðan sáttmála frá Fa. Bussferðir. Nýggja uppskotið verður framlagt á fundinum. Orsøkin fyri at neyðugt er at taka støðu til ískoytis sáttmála er, at til verandi koyring krevst ein bussur afturat. Hetta viðførir, at Fa. Bussferðir mugu útvega sær ein nýggjan (brúktan) buss til endamálið.

Eftir sum kommunan hevur ynski um ikki at vera eigari av bussum, tá sáttmálaskeið eru liðin (pr. 1.juli 2010), er neyðugt at ein evt. avskriving av nýggjum útvegaðum bussi skal vera í tíðini, ið eftir er av sáttmálaskeiðinum. Hetta viðførir, at annar tímaprísur eftir øllum at døma verður galdandi vegna ta stuttu tíðina, ið eftir er til avskriving.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at góðkenna sáttmálan.

**Tekniska nevnd 2. apríl 2009:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Símun Simonsen, Halla Samuelsen og Levi Mørk, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kostnaðurin av meirnýtsluni er íroknað í umbønini um eykajáttan j.nr. 2009-0575, og vísandi til málið **2008-3983** Endurskoðan av fíggjarætlanini fyri 2009 við atliti til fíggjargongdina higartil, verða sparingar í 2009, eisini gjørdar á leiðini sum Fa. Bussferðir røkir.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2009:** Jákup Egholm Hansen, tekniskur stjóri, kunnaði um støðuna.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2009:** Útsett.

**Býráðið 25. juni 2009:** Tikið av skrá.

**Ìskoyti:**
Umsitingin hevur havt fund við Hildur Jensdóttir frá Bussferðir um endurskoðaða sáttmálan.

Bussferðir hevur fingið at vita at Tórshavnar kommuna undir núverandi umstøðum, ikki kann góðtaka ein tímatakst á kr. 475,00. Eftir eitt drúgvt samskifti er Bussferðir gingið við til, at tímataksturin fyri restina av tíðarskeiðinum verður kr. 400,00. Hesin tímatakstur viðførir ikki ein meirkostna fyri sáttmálan við Bussferðir í hesum fíggjarárinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við teknisku nevnd 2. apríl 2009.

**Fíggjarnevndin 9. september 2009:** Ein meiriluti: Heðin Mortensen Elin Lindenskov Jógvan Arge og Jákup Símin Simonsen samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Sjúrður Olsen tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðið 17. september 2009:** Tikið av skrá.

**Býráðið 5. november 2009:** Tikið av skrá.

**208/09** **2005-3292**

**Parkeringsviðurskifti á Hálsi við ognina hjá P/f Berg Motors**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Í sambandi við viðgerðina av málinum um parkeringssonu á Hálsi í máli nr. 2003-1883, hevur spurningurin um óskipaðu parkeringina hjá P/F Berg Motors verið viðgjørdur eftir at tekniska nevndin 8. desember 2005 samtykti, at umsitingin tekur upp samráðingar við P/F Berg Motors v/Johs. Berg um at loysa parkeringstrupulleikarnar á ognini hjá virkinum.

Umsitingin hevur á kunnandi fundi við umboð fyri P/F Berg Motors tann 19. desember 2005 fingið upplýst hvussu virkið metir seg kunna fáa greiðu á parkeringstrupulleikunum á økinum. Notat er gjørt í málinum, j. nr 2005-3292/2.

Tað eru ymsir hættir at loysa trupulleikarnar við ogninia hjá P/F Berg Motors á Hálsi.

Ein háttur fyri at fáa loyst málið er at áleggja virkinum at seta girðingar upp á markinum millum privata og kommunala ogn sambært tinglýstum servitutti í skeytinum. Hetta førir við sær at kommunan verður noydd at gera gongubreyt á Títlingsveg og á økinum millum p-plássið á Hálsi og ognina hjá P/F Berg Motors. Trupult er harumframt við útsýninum fyri ferðslu, sum skal dreyga til vinstru út á R.C. Effersøes gøtu frá Títlingsvegi.

Ein annar háttur er at ognartaka partar av økinum hjá P/F Berg Motors, men henda loysn er tíðarkrevjandi og letur seg neyvan gera, tí kommunan væntandi ikki fær viðhald í væntandi kæru frá P/F Berg Motors.

Tann hátturin, sum er verdur at arbeiða víðari við er at viðmæla umsóknini um at gera eitt bilhús til uml. 25 p-pláss inni á ognini hjá virkinum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við uppskotinum um at gera eitt bilhús á ognini hjá P/F Berg Motors.

**Tekniska nevnd 9. februar 2006:** Nevndin samtykti, at P/F Berg Motors setir gyrðing upp sambært ásetingunum í skeytinum.

Marin Katrina Frýdal, formaður í teknisku nevnd, hevur ynski um at fáa viðgjørt spurningin um parkeringsviðurskiftini á økinum.

- Umsitingin greiðir frá gongdini í málinum.

**Tekniska nevnd 6. mars 2008:** Nevndin samtykti at halda fast við samtyktina hjá teknisku nevnd 9. februar 2006 og at P/F Berg Motors skal hava sett girðing upp í seinasta lagi 16. juni 2008.

- Umsitingin kunnar um status í málinum.

**Tekniska nevnd 18. september 2008:** Kunnað varð um gongdina í málinum og kunnað varð eisini um fund við Sp/f Berg Motors.
Nevndin samtykti eisini at halda fast við áðurnevndar samtyktir.

Borgarstjórin ynskir at fáa málið fyri nevnd.

**Tekniska nevnd 5. februar 2009:** Nevndin samtykti at halda fast við áður nevndar samtyktir.

- Formaðurin ynskir at fáa málið fyri nevnd.

**Tekniska nevnd 24. september 2009:** Nevndin samtykti at leggja málið fyri næsta býráðsfund.

**Býráðið 5. november 2009:** Tikið av skrá.

**209/09** **<u>2008-4365</u>**

**<u>Reglugerð fyri umsókn um uppsetan av vindmyllum til húsbrúk</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Tórshavnar kommuna hevur samsvarandi almennu heimildunum, ið fylgja býarskipanarlógini, sum byggivald rætt til at regulera uppseting av vindmyllum til húsbrúk sum byggimál. Eisini kann kommunan sum umhvørvismyndugleiki regulera vindmyllur til húsbrúk fyri soleiðis at tryggja sær, at hesar virða tær umhvørvisreglur, ið kommunan sum umhvørvismyndugleiki hevur ábyrgd av (sí serliga § 8 í kunngerð nr. 53 frá 1994 um umhvørvisreglur).

Farast kann ikki undir uppseting av myllu, fyrrenn skrivligt loyvi fyriliggur frá kommununi.

1. Vindmyllur til húsbrúk eru smáar vindmyllur, ið geva ískoytisorku til húsarhaldið, og sum ikki spenna meira enn 2.00 m í tvørmát (diametur).

2. Umsókn:
   Áðrenn farið verður undir at seta upp vindmyllur, skal umsókn um byggiloyvi sendast kommununi. Umsóknin skal í minsta lagi fevna um:

   a) Støðumynd (1:500) við mátum og plasering á grundstykki og fjarstøðu til næstu grannamørk og grannabygningar
   b) Síðumyndir (1:100)

c) Tvørskurð (1:50) við øllum neyðugum mátum
d) Fundamentstekningar (1:50) og upplýsingar um mastratypu o.a.
e) Skjalprógv fyri, at myllan lýkur ásettar óljóðstreytir, sí pkt. 3, e, niðanfyri
f) Frágreiðing um, hvussu myllan er fest og skjalprógv fyri, hvussu nógvan vind myllan tolir, sí pkt. 3, g, niðanfyri

3. Krøv: Krøvini til einstøku myllurnar

a) Tvørmát má í mesta lagi vera 2 m.
b) Hædd: Loyvda hæddin er í mesta lagi 3.5 m. omanfyri mest loyvdu byggihædd (miðaljørðildi), mált í mun til hægsta veingjapunkt á mylluni. Tó kann mesta hædd ongantíð vera meira enn 12.5 m. Hæddin upp til lægsta punkt á veingjum skal í minsta lagi verða 4 m.
c) Frástøða: Til nærmasta grannamark skal í minsta lagi vera 10 m. Myllan skal undir øllum umstøðum standa nærri húsinum, ið fær orku frá mylluni, enn grannahúsum. Øll mát eru í vatnrættari linju. Tá talan er um óbygda grannaogn, ella myllan er sett uttan fyri sethúsaøkið, verður neyðuga frástøðan og hæddin ásett í hvørjum einstøkum føri.
d) Óljóðstreytir o.a.: Óljóðið frá vindmylluni má ikki vera meira enn 39 og 37 dB við vindmegi á ávikavist 8 og 6 m/s mált inni á grannaogn við næsta húsavegg. Aðrir ampar enn hesir kunnu vera av óljóði o.ø., ið stendst av brúkinum, og skal kommunan taka støðu í hvørjum einstøkum føri, um brúkið er sambæriligt við umhvørvisreglurnar.
e) Styrkikrøv: Vindmyllan skal vera styrkigóðkend til vindferð í minsta lagi 60 m/s.
f) Onnur Krøv: Sjálv vindmyllan má ikki víkja avgerandi frá hæddini á øðrum konstruktiónum í umráðnum. Vindmyllan skal hava eina yvirflatu, sum í minst møguligan mun órógvar og reflekterar ljós.

4. Varnast kommunan, ella verður kommunan av øðrum gjørd varug við, at vindmyllan ikki lýkur ásetingarnar omanfyri, kann kommunan krevja, at vindmyllan fyribils verður steðgað. Verða viðurskiftini ikki fingin í rættlag, kann kommunan krevja, at vindmyllan verður tikin niður.

5. Kommunan ger vart við, at skaðar, ið vindmyllur gera á persónar ella annan mans ogn, eftir umstøðunum kunnu hava við sær endurgjaldsábyrgd fyri eigaran. Kommunan kann sum byggi- og umhvørvismyndugleiki ikki ábyrgdast fyri slíkar møguligar skaðar.

**Tilmæli:**
Borgarstjórin og kommunustjórin mæla býráðnum til at samtykkja uppskotið til reglugerð, treytað av undirtøku frá byggi- og býarskipanarnevndini og heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Einmælt samtykt at taka undir við uppskotinum frá Jan Christiansen um at beina avvarandi nevndir.

Kunnað verður um málið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 27. januar 2009:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Fyrisitingin hevur gjørt uppskot til reglugerð fyri umsókn um uppsetan av vindmyllum til húsbrúk í Tórshavnar kommunu. Reglugerðin tekur útgangsstøði í reglugerðini frá KSF 10. okt. 2008.

**Fyrimunir og vansar við uppsetan av vindmyllum:**

**Fyrimunir:**
Vindmyllur er ein umhvørvisvinarlig orkukelda; tær hava einki $CO_2$ útlát undir nýtslu. Við nýtslu av vindorku, verður oljunýtslan minkað og harvið $CO_2$ útlátið. Vindmyllur hava einfaldar konstruktiónir og eru lættar at viðlíkahalda. Smáar vindmyllur geva ískoytisorku til sethús.

**Vansar:**
Vindmyllur geva ljóð frá sær, og tað kann verða til ampa fyri fólk, sum búgva í nánd. Ljóðið er serliga til ampa um náttina. Og hóast mørk eru fyri, hvussu nógv ein vindmylla kann ljóða, kunnu grannar kortini hava ampar av hesum. Harumframt skal sigast, at tað er trupult og kostnaðarmikið at gera ljóðkanningar.

Serliga í økjum har tøtt búðstaðar bygging er, kann væntast at ampin av ljóði verður størstur. Somuleiðis er vandin fyri skaðum frá møguligum brotnum vindmyllunum, orsakað av vindi og/ella manglandi viðlíkahaldi, størstur í omanfyri standandi økjum.

Kommunan er blivin gjørd varug við, at í fleiri førum eru bløðini á vindmyllunum loysnaði frá vindmylluni, og eru hesi endaði í bønum ella í sethúsum nærhendis. Talan hevur verið um vindmyllur uttan fyri Tórshavnar kommunu.

Harumframt eru aðrir vansar, so sum estetisk viðurskifti, útsjónd o.a.

## Reglugerð fyri umsókn um uppsetan av vindmyllum til húsbrúk

Reglugerðin umfatar vindmyllur til húsbrúk, tað eru smáar vindmyllur, ið geva ískoytisorku til húsarhaldið, og sum ikki spenna meira enn 2.00 m í tvørmát (diametur).

**Heimild:**

Tórshavnar kommuna hevur samsvarandi almennu heimildunum, ið fylgja býarskipanarlógini, sum byggivald rætt til at regulera uppseting av vindmyllum til húsbrúk sum byggimál. Uppsetan av vindmyllu krevur byggiloyvi sambært kap. I § 2 stk. 3c í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Uppsetan av vindmyllum í Tórshavnar kommunu skulu lúka hesar treytir:**

**1. Innleiðing:**
Farast kann ikki undir uppseting av vindmyllu, fyrrenn skrivligt loyvi fyriliggur frá kommununi.

Eigari av vindmyllu hevur ábyrgd av, at hon verður sett upp, rikin og viðlíkahildin soleiðis, at hon ikki er til vanda ella ampa fyri grannar, náttúru og umhvørvi annars.

Eigari av vindmyllu hevur ábyrgd av, at halda reglugerðina.

Bert ein vindmylla kann verða á hvørjari ogn. Er talan um øki, sum í byggisamtykini liggur uttanfyri sethúsaøki, kann kommunan í serligum føri geva loyvi til uppsetan av fleiri vindmyllum.

**2. Umsókn:**
Áðrenn farið verður undir at seta upp vindmyllur, skal umsókn um byggiloyvi sendast kommununi. Umsóknin skal í minsta lagi fevna um:

- Støðumynd (1:500) við mátum og staðseting á grundstykki og fjarstøðu til næstu grannamørk og grannabygningar.
- Síðumyndir (1:100) við neyðugum mátum og frágreiðing.
- Fundamentstekning (1:50), umframt upplýsingar um mastraslag, mastraspennir og festi av hesum.
- Skjalprógv fyri hvat slag at vindmyllu talan er um og at hendan lýkur niðanfyri nevndu krøv.

**3. Krøv til einstøku myllurnar:**

a) Tvørmát má í mesta lagi vera 2 m.

b) Mesta vindmylluhædd, mált millum lendi og aksilin, skal ongantíð vera meira enn 9,0 m. Hæddin upp til lægsta punkt á veingjum skal í minsta lagi verða 4 m.

c) Frástøða til nærmasta grannamark skal í minsta lagi vera 10 m. Frástøðan til nærmasta húsavegg á grannaogn skal vera í minsta lagi 4 ferðir totalhæddina á vindmylluni. Vindmyllan skal undir øllum umstøðum standa nærri húsinum, ið fær orku frá mylluni, enn grannahúsum. Øll mát eru í vatnrættari linju.

d) Vindmyllur kunnu ikki setast upp í 1. og 2. grundumráði og í økjum sum hava serligan týdning, herundir m.a. við friðaðar og varðveitingarverdar bygningar ella tætt við mentunarlig hús og lutir (kirkjur, standmyndir, v.m.).

e) Takast skal hædd fyri at smáar vindmyllur ikki lýta landslagið. Býararkitekturin hevur avgerðarrætt í ivamálum.

f) Óljóðið frá vindmylluni má ikki vera meira enn 39 og 37 dB við vindmegi á ávikavist 8 og 6 m/s mált inni á grannaogn við næsta húsavegg.

g) Øll vindmyllan, íroknað undirstøði, mastur, manstraspennir og festi skulu vera styrkigóðkend til vindferð í minsta lagi 60 m/s.

h) Sjálv vindmyllan má ikki víkja avgerandi frá hæddini á øðrum bygningslutum í umráðnum. Vindmyllan skal hava eina yvirflatu, sum í minst møguligan mun órógvar og reflekterar ljós. Blaktran av ljósi má ikki verða til ampa fyri grannar.

i) Vindmyllan skal verða CE-góðkend, sambært kunngerð nr. 129 frá 4. september 1995 um innrætting av tøkniligum hjálpartólum

j) Vindmyllumastrar skulu kunna leggjast niður.

k) Tá vindstyrkin ferð uppum 20 m/s skal ein sjálvvirkandi bremsa aktiverast, soleiðis at hon heldur uppat at mala.

**4. Klagur og burturbeinan:**
Lýkur vindmyllan ikki ásetingarnar omanfyri, kann kommunan krevja, at vindmyllan fyribils verður steðgað. Verða viðurskiftini ikki fingin í rættlag, kann kommunan krevja, at vindmyllan verður tikin niður.

Tá vindmyllan ikki longur er í brúk, skal eigarin beina hana burtur, herundir eisini fundament og leiðingar.

**5. Gildisreglur:**
Reglugerðin kemur í gildi sama dag, sum hon er samtykt í býráðnum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til, at tikið verður undir við reglugerðini, og at málið verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina við áheitan um at reglugerðin verður ein partur av almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Mælt verður eisini til at vindmyllur, sum eru uppsettar í kommununi áðrenn hendan reglugerð kom í gildi, og sum ikki uppfylla treytirnar í reglugerðini, kunnu verða standandi í 3 ár, treytað av at ongar klagur koma frá grannum og øðrum.

**Heilsu- og Umhvørvisnevndin 6. oktober 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at tikið verður undir við reglugerðini. Eisini verður mælt til, at møguligar broytingar í almennu byggisamtyktini verða viðgjørdar í sambandi við endurskoðan av byggisamtyktini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. oktober 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 5. november 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**210/09** **2001-0243**

**Moldplássið í Kollfjarðardali, avrigging, freist 10. februar 2011**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Kollafjarðar kommuna avtalaði við festaran Rólv Djurhuus 17. februar 1989 við góðkenning frá Landsverkfrøðinginum at gera molddunga í Kollfjarðardali.

Molddungin skal slættast eftir ávísing bóndans. Hetta er bert partvíst gjørt, og avtalað er við tekniska stjóran og býarverkfrøðingin at gera fyrst stig av slættingini liðugt til 01. juni 2001.

Festarin er sinnaður at hildið verður fram at koyra mold og avgrevsrartilfar á hetta plássið, sí hjáløgdu tekning.

Verandi molddungi er komin eftir 10 árum.

Tað er skylda kommununnar at úvega pláss at koyra mold og avgrevstur á, samb. § 2. í Løgtingslóg nr. 77, frá 1. juli 1984.

Mett verður at tørvur framhaldandi verður á at hava molddunga í Kollafirði, og at sáttmáli verður gjørdur við festaran.
Tað verður ikki hildið skilagott at flyta mold allan vegin úr Kollafirði til mold- og tyrvingarplássið í Húsahaga.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. mars 2000:** Tikið verður undir við framhaldandi at hava molddunga í Kollafirði, sambært tekning frá frílendisdeildini, dagfest februar 2001.

**12. mars 2001: Byggi- og býarskipanarnevndin** samtykti uppskotið.

Avgjørt at slætta nakað av dunganum í ár, skal verða liðugt fyrst í juni mánað, men verður seinkað av verkfallinum.
Eingin peningur er settur av til arbeiðið, men tað verður goldið av rakstri, helvt um helvt tekniska deild og frílendisdeildin.
Arbeiðið er í gongd.

**Kollfjarðarnevndin 31. mai 2001:** Kunnað varð um gongdina í málinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at kommunan í skrivi frá 10. febr. 2009 frá Yvirfriðingarnevndini hevur fingið álagt at rigga moldplássið í Kollfjarðardali av, verður málið hervið lagt fyri viðkomandi faknevndir til støðutakan.

24. september 2002 loyvi frá LV at flyta íbindingina í landsvegin

10. juli 2008 skriv frá náttúrufriðingarnevndini viðv, loyvi at halda fram at tyrva á staðnum.

8. februar 2009 skriv til Yvirfriðingarnevndina um støðuna við mold- og avgrevstartyrvingarplássum í Kollafirði og kommununi sum heild.

10. februar 2009 skriv frá Yvirfriðingarnevndini um at lata plássið aftur í avriggaðum standi 2 ár frá móttøkuni av skrivinum, t.v.s. 10. februar 2011.

Dungin er í ár 20 ára gamal. Hann er lítið prýðiligur har hann liggur, men verður farið fram eftir tyrvingarplaninum frá 2001, verður væl frágingið.

Yvirfriðingarnevndin, Búnaðarstovan og festarin skulu hava fráboðan um støðutakan.

**Kostnaðarmeting:**

| | |
|---|---|
| Liðugtgerð og avrigging av moldplássinum. | 200.000 kr |
| Moldplanering uml. 13.000 m³ av mold skal flytast | 150.000 kr. |
| Samlaðar útreiðslur. íroknað mvg | 350.000 kr |

Sambært statusuppgerð primo september 2009 eru írestandi kr. 745.000,- á kt. 90-1011-11883.

Arbeiðið at gera gøtuna í Dalinum Langa er liðugt, og sostatt eru kr. 745.000,- í avlopi.

Sambært fíggjarnevndarsamtykt 9. september 2009 í máli nr. 2007-0649 (kloakk í Skraddaragøtu) eru fluttar kr. 260.000,- av kt. . 90-1011-11883. Sostatt eru tøkar kr. 485.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarvekfrøðingurin mæla til at játta 350.000 kr. av konto 90-1011-11883 til avrigging av molddunganum í Kollafjarðardali og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 15. september 2009:** Leiðarin fyri lendisdeildina, Tóri í Hoyvík, greiddi frá um málið.

Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 5. november 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**211/09** <u>**2009-2724**</u>

<u>**Undirskriftsreglur í sambandi við keyp og sølu av fastari ogn o.t.**</u>

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Sambært § 44, 2, í lóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýrið - kommunustýrislógin - skulu skjøl í sambandi við keyp og sølu av fastari ogn o.t. verða undirskrivað av borgarstjóranum og einum persóni, sum kommunustýrið hevur heimilað til tess.

Harumframt er ásett í § 6, 1. petti í Kommunustýrisskipanini fyri Tórshavnar kommunu, at øll skjøl, ið binda kommununa, skulu undirskrivast av borgarstjóranum og einum persóni, sum býráðið hevur heimilað til tess.

Av tí at tað er rættuliga long tíð síðani at fráfarni kommunustjórin fór úr starvi, liggja fleiri skjøl og bíða eftir undirskrift frá tí, sum hevur heimild at binda kommununa saman við borgarstjóranum. Hetta er sera óheppi og órógvandi fyri dagliga arbeiðið hjá umsitingini, og tí eigur hetta at verða fingið í rættlag alt fyri eitt, nú nýggjur kommunustjóri er settur.

Formelt skal heimildin gevast á einum býráðsfundi, men næsti regluligi býráðsfundur verður ikki fyrrenn tann 5. november 2009. Møguligt er sjálvandi at kalla inn til ein eykabýráðsfund, at viðgera bert hetta málið, men havandi í huga at flest øll eru í heystfrí, er neyvan møguligt at halda ein slíkan fyrrenn seinast í næstu viku ella fyrst í aðru viku.

Mett verður tí, at málið kann avgreiðast við, at allir býráðslimir taka støðu til málið umvegis teldupost, og at málið síðani formelt verður viðgjørt á fyrstkomandi býráðsfundi tann 5. november.

Málslýsingin við tilmæli, sum skal viðgerast á býráðsfundinum, er viðfest hesum telduposti, og verða tit vinaliga biðin um sum skjótast at svara aftur í seinasta lagi mánadagin 19. okt kl. 12:00, um tit taka undir við tilmælinum ella ikki.

Um tit ynskja at kalla verður inn til eykabýráðsfund at viðgera málið verða tit biðin um at siga frá hesum. Ynskir 1/3 av kommunustýrislimunum tað (kommunustýrislógin § 13, stk. 2), verður innkalla til ekabýraðsfund sum skjótast.

Játtandi svar kom frá Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrinu Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Jákup Símun Simonsen, Jan Christiansen, Annfinn Brekkstein, Maria H. Olsen, Vagnur Johannesen.

**Býráðið 5. november 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**212/08** **2004-0558**

**Mál um 10. flokk**

Á fundi í mentamálanevndini 8. februar 2006 samtykti nevndin at heita á skúlastjórarnar í framhaldsskúlunum í Tórshavnar kommunu at velja fimm fólk í ein arbeiðsbólk at viðgera 10. flokk.

Arbeiðssetningurin hjá bólkinum var soleiðis orðaður:

*Arbeiðsbólkurin verður biðin at koma við uppskoti, hvussu 10. flokkur skal verða skipaður undirvísingarliga í framtíðini, og um hann skal verða skipaður í eina eind ella fleiri eindir.*

Heitt varð á arbeiðsbólkin at lata mentamálanevndini uppskotið í seinasta lagi 15. mai 2007.

**Í arbeiðsbólkin vórðu tilnevnd:**
Eyðdis Eidesgaard, formaður, umboð fyri skúlastjórarnar
Jacob Thomsen, lærari í Tórshavnar Kommunuskúla
Símun Joensen, lærari í Eysturskúlanum
Birgir Mortensen, lestrarvegleiðari í Handilsskúlanum í Havn, umboð fyri miðnámskúlarnar
Joel undir Leitinum, stjóri í Samskip, umboð fyri vinnulívið

Høgni Joensen, skrivari, umboð fyri býráðið

Álitið um 10. flokk verður framlagt á fundinum.

**Mentamálanevndin 2. oktober 2007:** Høgni Joensen, skrivari í arbeiðsbólkinum, legði álitið fram.

**Niðurstøða hjá arbeiðsbólkinum**
Arbeiðsbólkurin er samdur um, at neyðugt verður at tillaga 10. flokk til nýggjar tíðir og nýggjar avbjóðingar, og at hugburðurin um 10. flokk skal broytast frá at vera endin á fólkaskúlanum til at verða byrjanin til eina útbúgving.

Í 10. flokki skulu næmingar uppliva eitt øðrvísi skúlaár, har hann/hon hevur ávirkan, setur saman og fullførir sítt skúlaár. Er virkin í einum dynamiskum ungdóms- og útbúgvingarumhvørvi, har dentur verður lagdur á tað fakliga og at vera við at taka avgerðir undir felags ábyrgd, har álit og virðing eru lyklaorð.

Men arbeiðsbólkurin er ikki fullsamdur um eitt felags tilmæli. Annað tilmæli er tí frá einum meiriluta: Eyðdis Eidesgaard, Símuni Joensen, Joel undir Leitinum, Birgiri Mortensen og Høgna Joensen og hitt frá einum minniluta: Jákupi Thomsen.

Meirilutin heldur, at í Tórshavnar kommunu skulu allir 10. floks næmingar verða savnaðir í ein depil, sum skal geva teimum, ið taka av tilboðnum, eitt spennandi og fjølbroytt skúlaár, har tey koma at hitta nýggjar floksfelagar og lærarar og leggja lunnar undir framtíðarlesnað og framtíðaryrki.

10. floksdepilin skal *ikki verða partur* av einum øðrum skúla, men verður ein sjálvstøðugur skúli við egnari leiðslu og lærarum.

Neyðugt verður at seta ein skúlaleiðara og ein varaskúlaleiðara, eitt skrivstovufólk og uml. 10-12 lærarar, sum burturav undirvísa í 10. floksdeplinum. Væntast skal, at tveir lærarar eisini hava útbúgving sum lestrarvegleiðarar. Hinir lærararnir skulu í høvuðsheitum tryggja, at næmingarnir verða undirvístir í lærugreinum og breytum.

Minnilutin mælir til, at 10. flokkarnir verða skipaðir í tvær skúlaeindir. Onnur skúlaeindin verður knýtt at Kommunuskúlanum og hin at Eysturskúlanum. Næmingarnir, ið ganga í Argja skúla og í Venjingarskúlanum, skulu sjálvir gera av, hvørja skúlaeind teir velja.

**Tilmæli frá arbeiðsbólkinum um 10. flokk**

**Meirilutatilmæli**
Eyðdis Eidesgaard, Símun Joensen, Joel undir Leitinum, Birgir Mortensen og Høgni Joensen.

**Skúlaeindin**
Meirilutin í arbeiðsbólkinum mælir til at savna allar 10. floks næmingarnar í Tórshavnar kommunu í ein sjálvstøðugan skúladepil frá skúlaárinum 2008/2009 við egnari leiðslu og lærarum, sum burturav arbeiða í hesum skúla.

Mælt verður eisini til, at 10. floksdepilin fyribils verður í e-lonini í Eysturskúlanum, men við framtíðini í huga, eigur at verða miðað eftir at byggja ein nýggjan 10. floksdepil í Marknagili.

**Lærarar**
Lærarar, sum eru hugaðir at undirvísa í 10. floksdeplinum, skulu hava møguleika at søkja um farloyvi úr skúlanum, har teir eru í føstum starvi. Farloyvi skal í minsta lagi verða játtað í 2 ár.

**Skipanin**
Hvussu 10. flokkur skal verða skipaður undirvísingarliga, mælir arbeiðsbólkurin til at varðveita breytatilboðini og starvslæruna. Temalestur og brúgvasmíð skal eisini standa næmingunum í boði. Brúgvasmíð skulu verða skipað formliga.

Føroyskt, enskt og støddfrøði verða kravdar lærugreinir. Danskt, týskt, alisfrøði, evnafrøði, átrúnaður (religión), samtíð, lívfrøði og landalæra verða vallærugreinir. Hetta krevur lógarbroyting.

Tveir tímar um vikuna verða settir av til “floksins tíma”, har næmingurin m.a. fær høvi at hitta sín kontaktlærara ella arbeiða við síni verkætlan. Kontaktlærarin hevur ábyrgd av 12-15 næmingum. Flokslæraraskipanin verður tikin av, tí næmingarnir verða undirvístir í bólkum heldur enn í flokkum.

Tað skal verða tvungin uppmøting og skylda at lata inn skrivligar uppgávur.

Næmingunum eigur at standa í boði at taka ella gera fráfaringarroynd fólkaskúlans betri, t.e. 9. flokkur, og taka víðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans, t.e. 10. flokkur í føroyskum, donskum, enskum, týskum, støddfrøði, alisfrøði og evnafrøði.

**Minnilutatilmæli**
Jákup Thomsen.

Minnilutin í arbeiðsbólkinum mælir til, at 10. flokkarnir verða skipaðir í tvær skúlaeindir.

Grundgevingin er, at tað er týdningarmikið, at næmingarnir ikki verða miðsavnaðir í eina eftir føroyskum viðurskiftum ov stóra eind, tí tá er vandi fyri, at menningin og fjølbroytnið í skipanini ikki verða tryggjað nóg væl.

Við tveimum skúlaeindum, ið ikki eru ov stórar, verður fakliga og sosiala samveran ímillum næmingar og lærarar betur tryggjað, og tískil er lærarin betur førur fyri at hjálpa tí einstaka næminginum. Víst verður eisini á, at tað er týdningarmikið fyri menningina at hava tvær eindir, sum kappast um at geva næmingunum tey bestu tilboðini.

Minnilutin mælir til, at onnur skúlaeindin verður knýtt at Kommunuskúlanum og hin at Eysturskúlanum. Næmingarnir, ið ganga í Argja skúla og teir í Venjingarskúlanum, skulu sjálvir gera av, hvørja skúlaeind teir velja at fara í. Annars tekur minnilutin í høvuðsheitum undir við uppskotinum, hvussu undirvísingin í framtíðini verður skipað, og at skúlaeindirnar framvegis samstarva um breytatilboðini.

**Tilmæli frá trivnaðarfyrisitingini**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við tilmælinum hjá meirilutanum um at savna allar 10. floks næmingarnar í Tórshavnar kommunu í ein sjálvstøðugan skúladepil í e-lonini á Eysturskúlanum við egnari leiðslu og lærarum, sum burturav arbeiða í hesum skúla.

**Grundgeving:**
Vísandi til álitið meta trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin, at ov fáir næmingar eru til at skipa tvær 10. flokseindir við nøktandi undirvísingartilboði.

Í álitinum verður staðfest, at tað í dag er ein stórur trupulleiki at fáa lærugreinir lisnar, tí næmingagrundarlagið er ov lítið. At skipa 10. flokkarnar í tvær eindir broytir lítið upp á hetta.

Endamálið við 10. flokki er, at næmingurin meira enn áður skal kunnu seta saman sína egnu útbúgving. Bert við einum rímiliga stórum næmingagrundarlagi kunnu skúlarnir bjóða nøktandi lærugreina- og breytartilboð.

Í skúlaárinum 2006/2007 góvust nærum ¼ av næmingunum í 10. flokki, tað svarar til tveir heilar flokkar. Hetta er dýrt fyri kommununa, fyri landið og ikki minst menniskjaliga fyri einstaka næmingin.

Skulu vit megna at broyta hugburðin til, at 10 flokkur skal verða byrjanin til eina útbúgving heldur enn endin á fólkaskúlanum, krevst nýhugsan á skúlaøkinum. Skal tað eydnast at skipa eitt kveikjandi læru- og ungdómsumhvørvi fyri næmingarnar í 10. flokki og byggja brúgvar til aðrar útbúgvingarstovnar og vinnulívið, verður neyðugt at broyta verandi skúlabygnað, soleiðis at 10. skúlaárið verður ein sjálvstøðug skúlaeind.

Býráðið hevur tikið avgerð um at skipa nýggju skúlarnar í kommununi úr 1. upp í 9. flokk. Rætt er at lata hendan leistin galda fyri allar skúlar í kommununi, og skipa eina sjálvstøðuga 10. flokseind at taka ímóti næmingum úr øllum skúlunum við tí fyri eyga, at 10. flokkur verður byrjanin til eina útbúgving.

Hølisliga letur tað seg gera at skipa 10. flokk í eina sjálvstøðuga eind í e-lonini í Eystursskúlanum. Har eru góð undirvísingarhøli, serstovur, bókasavn o.a. Fortreytir, sum gera, at møguleikar eru at skipa eitt gott og mennandi umhvørvi hjá bæði næmingum og lærarum.

Í Tórshavnar Kommunuskúla eru sum er trongir høliskarmar. Tí ber illa til at ímynda sær, at tað fer at bera til at skapa nóg góðar og spennandi umstøður til enn fleiri næmingar.

**Mentamálanevndin 23. oktober 2007:** Málið umrøtt og útsett til ein seinni fund.

**Býráðið 25. oktober 2007:** Tikið av skrá.

***Uppískoyti:***
Týsdagin 29. januar 2008 høvdu tey ellivu skúlastýrini í Tórshavnar kommunu felagsfund um álitið *"10. flokkur – ein øðrvísi skúli"*, ið arbeiðsbólkur á heysti 2007 handaði mentamálanevndini.

Undan fundinum høvdu skúlastýrislimir, býráðslimir og onnur fingið álitið at lesa ígjøgnum.

Eftir framløguni frá arbeiðsbólkinum var orðaskifti um álitið, og fingu skúlastýrini fjúrtan dagar at ummæla og viðgera tilmælini í álitinum og koma aftur til arbeiðsbólkin við sínum tilmælum og viðmerkingum.

Tíggju skúlastýri hava gjørt viðmerkingar til álitið, og eru tey øll samd um at taka undir við tilmælinum frá meirilutanum í arbeiðsbólkinum, sum mælir til at skipa 10. flokk í ein sjálvstøðugan skúla við egnari leiðslu og lærarum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við skúlastýrunum at skipa 10. flokk í ein sjálvstøðugan skúla við egnari leiðslu og lærarum í e-lonuni á Eystursskúlanum, frá skúlaárinum 2009/2010 at rokna.

**Mentamálanevndin 5. mars 2008:** Ein meiriluti, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Inga Dahl, samtykti at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum um at skipa 10. flokk í ein sjálvstøðugan skúla við egnari leiðslu og lærarum í e-lonuni á Eystursskúlanum, frá skúlaárinum 2009/2010 at rokna.

Ein minniluti, Beate L. Samuelsen, tekur undir við tilmælinum, tó soleiðis at byrjað verður frá skúlaárinum 2010/2011 at rokna.

**Býráðið 27. mars 2008:** Fyrst varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá mentamálanevndini, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 6 atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Kathrina Frýdal og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Inga Dahl, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Leivur Hansen og Halla Samuelsen

Síðan varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá mentamálanevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Býráðslimur biður um at fáa málið á skrá.

**Býráðið 5. november 2009:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Heðin Mortensen, um at beina málið í fíggjarnevndina, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Rúni M. Djurhuus, Levi Mørk, Inga Dahl, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Maria Hammer Olsen og Anfinn Brekkstein.

Halla Samuelsen, Levi Mørk, Rúni M. Djurhuus, Maria Hammer Olsen og Annfinn Brekkstein viðmerktu, at tey ynskja, at málið verður lagt fyri býráðið aftur 17. desember 2009.

**213/09** **2003-2371**

**Søulpláss til matvørur v.m. í Vágsbotni**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Plássið í Vágsbotni, ið sambært politiviðtøkuni § 34, 2. petti, verður nýtt til sølu av nýveiddum fiski, fugli o.t., lýkur ikki reinføriskrøv o.a., sum fylgja av matvørulógini. Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur boðað kommununi frá, at um søluplássið skal góðkennast til sølu av matvørum, eigur tað at skipast sambært galdandi krøvum.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin mælir heilsu- og umhvørvisnevndini til at samtykkja, at álagt verður umsitingini at gera skitsuuppskot og kostnaðarmeting av søluplássi, ið kann góðkennast av Heilsufrøðiligu starvsstovuni til sølu av matvørum, at leggja fyri nevndina aftur.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 9. desember 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum.

**Ískoyti:**
Skitsuuppskot og kostnaðarmeting av søluplássinum fyriliggur.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 22. september 2005:** Nevndin ynskir at umsitingin setur seg í samband við partarnar í málinum, áðrenn støða verður tikið til skitsuuppskotið.

**Ískoyti:**
Málið er sent til hoyring hjá Heilsufrøðiliga starvsstovan og hjá Tórshavnar Havn. Málið er samstundis beint í ferðslunevndina og byggi- og býarskipanarnevndina til viðmerkingar.

Heilsu- og umhvørvisdeildin ynskir at fáa byggi- og býarskipanarnevndina at taka støðu til um byggiloyvi til sølupláss í Vágsbotni kann veitast.

Málið verður við hesum lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tilmæli:**
Býararktiekturin mælir til at loyvi verður at byggja omanfyrinevndu sølupláss.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. desember 2005:** Nevndin tekur undir við at arbeitt verður víðari við ætlanini.

**Ískoyti:**
Við støði í viðmerkingum frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni og Tórshavnar havn leggur umsitingin eitt meira ítøkiligt uppskot til sølupláss í Vágsbotni fram á fundinum, sí mál 2003-2371/13.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at søkt verður hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni um loyvi til sølupláss fyri veiðu í Vágsbotni og at arbeitt verður víðari við ætlanini.

**Tekniska nevnd 9. februar 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 16. februar 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Ferðslunevndin 21. februar 2006:** Nevndin tekur undir við uppskotinum.

**Ískoyti:**
Umsókn viðv. søluplássi í Vágsbotni er sent Heilsufrøðiligu starvsstovuni (HS) 8. mars 2006. Í brævi hin 2. juni 2006 kann HS geva tilsøgn til sølupláss í Vágsbotni, um niðanfyri nevndu treytir verða fylgdar:

- Týning av skaðadjórum. Rottukassar skulu plaserast fram við kaiøkinum.
- Vesifasilitetir, sum ikki eru almennir, skulu verða til sølufólkið.

Umsitingin mælir til, at vesifasilitetir verða gjørdir í húsinum hjá bátafelagnum. Ein nýggj kostnaðarmeting av søluplássinum fyriliggur (sí j. nr. 2003-2371/21).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla fíggjarnevndini til at játta kr. 1,55 mill. til gerð av søluplássi í Vágsbotni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 30. oktober 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við ætlanini og at biðja umsitingina um sundurgreina uppskot um fígging.

**Broyting í tilmæli:**
Av tí mælt verður til at gera arbeiði í stigum, har fyrsta stig er teir fyrstu 8 yvirdekkaðu plintarnir, og toilett til sølufólkið, er tilmælið broytt soleiðis:

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta uml. kr. 1,0 mill. til gerð av søluplássi í Vágsbotni av konto fyri íløgur.

**Tekniska nevnd 2. november 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við samtyktini hjá byggi- og býarskipanarnevndini 30. oktober 2006.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 16. november 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Nýtt:**
- Tilboð eru innkomin fyri fyrsta byggistig og varð J.B. Kyster lægstir, áljóðandi 2.800.440,- kr., uttan MVG.
- Næsta byggistig, verður mett at kosta uml. 1.500.000,- kr. uttan MVG, um gingið verður eftir verandi einleikaprísum.
- Kostnaðarmetingin fyri samlaðu verkætlanina við projektering, eftirlit v.m. er umleið 4.500.000,- kr. uttan MVG.
- Partur av verkætlanini umfatar nýggjan kaikant.

**Tilmæli:**
Tekninski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at taka undir við at gera fyrsta byggistigið og at nevndin umvegis fíggjarnevndina játtar pening til verkætlanina.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 15. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum og mælir býráðnum um fíggjarnevndina at játta kr. 2,4 mió. til verkætlanina.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini og at játta kr. 2.4 mió. afturat kr. 1 mió., sum áður er játtað.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Í sambandi við virksemið á sølutorginum hevur Heilsufrøðiliga starvsstovan boðað kommununi frá, at ein av treytunum fyri góðkenningini var, at dagliga virksemið skuldi verða fyrisitið av umsjónarmanni.

Sambært fíggjarætlanini fyri 2009 er eingin játtan sett av til virksemið hjá umsjónarmanninum, og tískil hevur virksemið á sølutorginum ikki verið eftir áseting frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Neyðugt er, at kommunan fylgir treytunum í góðkennigini frá Heilsu- og umhvørvisstovuni, um sølutorgið skal varðveita sína góðkenning, og at neyðug játtan í hesum sambandi verður avsett til umsiting av sølutorginum. Við umsiting av sølutorginum fevnir um umsjónarfólk, útgerð og tilfar til reingerð, skelting, telefonútreiðslur, umvælingar og ábøtur o.l. Mettur kostnaður er uml. kr. 200.000 árliga.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til, at játtaðar verða kr. 200.000,- til umsiting av sølutorginum fyri fíggjarárið 2010. Harumframt verður mælt til at fyribils avtala verður gjørd við áhugaðan umsjónarmann fyri restina av 2009 – fíggjað av konto 03-2020.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 25. august 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 25. august 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Stjórnin hevur viðgjørt málið um rakstur av sølutorginum. Fyri at tryggja, at sølutorgið ikki kann gerast ein kappingaravlagandi kommunal tænastuveiting verður mett, at raksturin av sølutorginum eigur at verða inntøkufíggjaður í tann

mun tað ber til. Hetta kann gerast á tann hátt, at sølutorgið fær eina rakstrarjáttan, soleiðis sum samtykt av heilsu- og umhvørvisnevndini 25. august 2009, men at tað samstundis verður sett sum krav,

- at tey sum ynskja at selja vørur í Tórshavn, av slíkum slag, sum sølutorgið er góðkent til, **skulu** selja sína vøru á sølutorginum, og at møgulig søluloyvir, sum eru til at selja aðrastaðni, sostatt verða inndrigin
- at tey sum ynskja at selja vørur, fáa útflýggja eitt søluloyvi frá umsjónarmanninum ella Snarskivuni, sum skal hanga uppi á sølustaðnum
- at tey rinda eitt gjald, sum verður ásett sum eitt fast gjald ella sum eitt prosentgjald av søluni

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til at takað undir við heilsu- og umhvørvisnevndin 25. august 2009, og at umsitingin samstundis fær heimild til at gera uppskot til eina skipan, sum ikki er kappingaravlagandi, sambært omanfyristandandi ískoyti, at leggja fyri viðkomandi faknevndir og býráðið.

**Fíggjarnevndin 9. september 2009:** Nevndin samtykti:

1. at mæla býráðnum til at avseta á fíggjarætlanini fyri 2010, kr. 200.000 til rakstur av sølutorginum
2. at heita á umsitingina um at gera eitt fullfíggjað uppskot til sølutorg, íroknað streymveiting, ljós, vindskermar, og onnur krøv sambært góðkenningini frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni
3. at heita á umsitingina um at kanna møguleikarnar fyri samskipan við onnur kommunal rakstrarstøð í økinum, ella at gera avtalu við felag ella persón um at standa fyri dagliga rakstrinum

**Býráðið 5. november 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**214/09** **2009-2416**

**Viðvíkjandi sølu av sethúsagrundøki matr. nr. 1 us, Hoyvík. ( Niðaragøta 5 ) (vísandi til j. nr. 2009-1448)**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Kommunan hevur lýst omanfyri nevnda grundøki í fríðari sølu.

Freistin at leggja boð inn varð ásett til 1. oktober 2009, og komu tvey boð inn uppá stykkið.

Annað boðið var uppá kr. 380.000,00 og varð hetta boðið treytað av at grundøkið var útgrivið og planerað.

Hitt boðið var uppá kr. 400.000,00 og uttan treytir.

**Ymiskt viðvíkjandi grundøkinum:**
Talan er um eitt sethúsagrundøki, sum er til støddar 534 fermetrar. Grundøkið er ikki útgrivið ella planerað, men eru allar tekniskar veitingar innlagdar, og er vegur til stykkið.

Grundstykkið liggur væl fyri sum soleiðis, men er stykkið heldur bratt.

Talan er tí um eitt rættuliga umfatandi arbeiðið at grava út og planera.

Besta loysnin er helst at byggja eini hús við kjallara, harav ovara síða av kjallarahæddini verður undir jørð, og verða húsini tá ið hædd við innkoyringina til stykkið.

Ein leystliga mettur kostnaður til at grava út og planera til hús við kjallara er millum kr. 150.000,00 og kr. 200.000,00.

Um grundøkið verður selt fyri kr. 400.000,00 og kostnaður til útgrevstur/planering er kr. 200.000,00 verður metti fermetrarprísurin kr. 1.125.

Til samanberðingar kann sigast at fermetraprísurin í útstykkingini Býlingur við túnum roknað út frá 300 fermetrum er kr. 1.620.

Talan er tó um 200 fermetra grundøki + 100 fermetrar til veg og felagsøki. Nettonýtsluvirðið er kannska 225 fermetrar, og út frá hesum verður fermeturprísurin kr. 2.160

**Tilmæli.**
Tað kann viðmerkjast at eftir freist, hevur løgdeildin fingið fleiri fyrispurningar um stykkið.

Mett verður at innkomnu boðini eru ov lág.

Leiðarin av løgdeildini mælir til at havna innkomnum boðum, og mælir samstundis til, at grundøkið verður lýst aftur til sølu, tá ið tíðin er mett búgvin til tess.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at selja stykkið til hægstbjóðandi.

**Býráðið 5. november 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**215/09** **2009-2644**

**Frábýti av grundstykki í sambandi við útstykking í Nólsoy.**

**Lýsing og samandráttur av málinum:**
Í februar 2009 lýsti Tórshavnar kommuna 9 grundstykkir í útstykkingarætlanini í Nólsoy til sølu í bløðunum.

Bert ein umsøkjari vísti áhuga og var á fundi í Nólsoy í summar sagt frá, at kommunan var sinnað at kanna møguleikan at selja viðkomandi eitt stykki burturav ætlaðu útstykking, um tað var tekniskt møguligt.

Mett verður at sunnasta stykki í útstykkingarætlanini, ið liggur sum ein náttúrlig longjan av verandi sethúsaøki fram við Válagøtu, kann nýtast til bygging og íbindast í leiðingar í verandi vegi, uttan at hetta á nakran hátt forðar restini av verkætlanini í at verða framd seinni.

Hjálagt er viðmerking frá teknisku deild.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at sunnasta stykkið í útstykkingarætlanini verða frámatrikulerað, við tí fyri eyga, at verða boðið til sølu til viðkomandi umsøkjara, ella um hesin ikki tekur av, so í øðrum lagi at selja stykkið eftir bíðilistanum, fyri tann í sambandi við samlaðu verkætlanina metta fermeturprísin, og við teimum treytum, sum annars verða galdandi fyri samlaðu ætlanina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. oktober 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 5. november 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**216/09** **<u>2009-2271</u>**

**<u>Umsókn um sundurbýti til tvíhús matr.1470co Tórugøtu 25, Tórshavn.</u>**

**Lýsing og samandráttur av málinum:**
Umsókn frá Sigmundi av Teigum um at sundurbýta matr.nr. 1470co Tórshavn til eini tvíhús.

Byggiloyvi er givið eftir eina grannahoyring. Húsini eru bygd og nú er klárt at sundurbýta.

Søkt verður eisini um at avlýsa ein servitutt sum er lýstur á 1470co um at bert er loyvt at byggja stakhús, hendan áseting í servituttinum hevur verið til grannahoyringar hjá grannum og eigarafelaganum.

Víst verður til byggimálini j.nr 2004-2333 og 2006-1401.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti at sundurbýta matr.nr. 1470co til tvíhús og at avlýsa servituttin á matr. 1470co og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. oktober 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 5. november 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**217/09** **2007-1961**

**Eyka leiguútreiðslur í sambandi við Argja skúla**.

Tá ið byggingin av Argja skúla var boðin út í mai 2008 var ætlanin at fyrri partur skuldi standa liðugur í juni 2009 og allur skúlin skuldi verða liðugur í juni 2010.

Málið hevur drigið út orsakað av fíggjarkreppu og kommunuvali í fjør heyst og tí var sáttmálin um byggingina ikki undirskrivaður fyrr enn 1. apríl í ár. Tíðarætlanin var sjálvandi broytt og avtalað er, at allur skúlin skal verða liðugur 1. juni 2011.

Í kostnaðarmetingini vóru kr. 500.000,- settar av til fyribils atgerðir í sambandi við at skúlin skuldi byggjast í tveimum byggistigum. Hesin peningur kann ístaðin brúkast til leiguútreiðslur í byggitíðini, men av tí at byggingin ikki kom í gongd sum upprunaliga ætlað, er leigutíðin longd og hendan upphædd ov lítil.

Samlaður kostnaður av leiguútreiðslum til skúla og frítíðarskúla í byggitíðini verður kr. 1.265.000,- . Tvs. kr. 765.000,- meira enn sett er av til hetta endamál.

Pláss er á íløgum frá verkætlanini nýggjur skúli á Hamrinum á Argjum konto 1033-90-33019, konto: ókent til byggiharrans nýtslu, til hesar útreiðslur.

Vísandi til politisk fyrisitingarligu mannagongdina fyri verkætlanir fíggjaðar av íløgum, og mannagongd fyri bygginevndir, fellur tað uttanfyri heimildir bygginevndarrinnar at takað avgerð um avleiddar rakstrarútreiðslur og um broyting at íløgukarminum, og verður málið tí hervið lagt fyri avvarðandi faknevndir og býráðið til støðutakan.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og trivnaðarstjórin mæla til at flyta kr. 1.265.000 frá konto 1033-90-33019 til 30-5640 og 566-5640 soleiðis:

Konto.30-5640, Argja skúli
2009 kr. 178.000,-
2010 kr. 534.000,-
2011 kr. 311.500,-

Konto.566-5640, dagstovnurin Løkjatún
2009 kr. 42.000,-
2010 kr. 126.000,-
2011 kr. 73.500,-

**Mentamálanevndin 21. oktober 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 5. november 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**218/09** **2009-2761**

**Setan av trivnaðarstjóra**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Nú trivnaðarstjórin seinastu árini er settur í starv sum kommunustjóri, má lýsast eftir nýggjum trivnaðarstjóra.

Í hesum sambandi er uppskot til mannagongd, lýsing og persónsprofil gjørt, ið verður lagt fyri fíggjarnevndina og býráðið til góðkenningar.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskoti til mannagongd, lýsing og persónsprofil.

**Býráðið 5. november 2009:** Einmælt samtykt at lýsa eftir trivnaðarstjóra við umsóknarfreist mikudagin 25. november 2009 kl. 12:00. Spurningurin um setanarbólk verður viðgjørdur á fyrskomandi býráðsfundi.

**219/09** **2007-1213**

**Rottangaplássið**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Leiðarin á kommunalu brennistøðini greiðir frá málinum um rottangaplássið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 24. apríl 2007:** Kunnað varð um málið, og notat j. nr. 2007-1213/2 varð lisið upp.

- Sum greitt varð frá um málið á seinasta fundi, og sum framgongur av notati j.nr. 2007-1213/2, er tørvur á einhvørjari skjótari loysn fyri at loysa trupulleikarnar á rottangaplássinum, um rottangatømingin skal halda fram.

**Tilmæli:**
Leiðarin á KB mælir til, at farið verður undir at gera neyðugar fyrireikingar til at etablera nýtt framkomið rottangapláss í grótbrotinum á Glyvursnesi, og at fígging verður avsett av íløgum. Nýtt rottangapláss skal helst verða liðugt innan 1-2 ár.
Samstundis mugu fyribils tiltøk fremjast á verandi rottangaplássið við t.d. tangum til rottangaevjuna. Mælt verður til at innkeyp av 1-2 tangum verður fíggjað av rakstri, og at innkeyp av fleiri tangum komandi ár verður fíggjað av íløgum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 2. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinumm hjá leiðaranum á kommunalu brennistøðini.

**Ískoyti:**
KB fekk tilboð uppá tanga til rottangaevju um mánaðarskifti juni/juli, og bílegging uppá 1 tanga til rottangaevju varð gjørd seinast í august. Tangin er tó ikki komin til landið enn. Síðani er tilboð upp á fundament eisini fingið til vega.
Samlaði kostnaðurin fyri tangaloysnina gerst væl hægri enn upprunaliga mett. Kostnaðurin fyri ein tanga, íroknað flutning, fundament, uppseting, 10% ókent og mvg verður á leið kr. 640.000 í mun til metingina á kr. 300.000.
Hesin kostnaður fyri ein goymslutanga (kr. 640.000) verður fíggjaður av rakstri í ár (2007).

Í 2008 eru avsettar kr. 2.000.000 til rottangatøming. Harav var ætlanin at gera avtalu við IRF um tøming av 2000 rottangum á kr 310 pr. stk. Og nýta restina av teimum kr. 2.000.000 til goymslutangar. Um IRF skal tøma 2000 rottangar, er fíggjarligt rúm fyri 2 goymslutangum, meðan upprunaliga málið var at fáa til vega 6 goymslutangar, fyri at nøkta tørvin.

Av tí at evjan framvegis er rættiliga bleyt, hóast hon hevur ligið á plássinum eina tíð, er tað bráðneyðugt at gera ein verjugarð í eystara borði á rottangaøkinum, fyri at fyribyrgja, at evja skolar oman av plássinum. Hesin verjugarður átti upprunaliga at vera, sambært góðkenningini, men er ikki har, helst er hann spardur burtur. Kostnaðurin av at gera ein tílíkan garð er kr. 0,9 mió.

Skipað rottangatøming varð sett í gongd á heysti í 2006 og á vári 2007 vóru umleið helvtin av rottangunum (umleið 2000) í Tórshavnar kommunu tømdir. Tá mátti tømingin halda uppat, tí umstøður vóru ikki til at handfara meiri evju. Av tí sama mátti evjan frá umleið 300 tangum avskipast á pláss hjá IRF, og hevur Tórshavnar kommuna bundið seg til at taka ímóti somu nøgd aftur frá IRF. Síðani várið 2007 eru tí einans gjørdar bárðfeingis tangatømingar, umframt tøming av reinsiverkum.

Leiðarin á KB metir tað ikki vera vera forsvarligt at seta gongd á aftur skipaða rottangatøming fyrr enn fysisku umstøðurnar á móttøkuplássinum eru nøktandi, tí evjan kann ikki handfarast og goymast trygt undir núverandi umstøðum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á kommunalu brennistøðini mæla til:

1. At verjugarður verður gjørdur beinanvegin og fígging áljóðandi kr. 0,9 mió. fingin til vega av íløgum fyri 2008 (víst verður til skjal nr. 2007-1213/5)
2. At taka støðu til innkeyp av fleiri goymslutangum, tá ið royndir við fyrsta tanganum fyriliggja
3. At uppraðfesta nýtt framkomið rottangapláss, ið skal vera undir taki í grótbrotinum á Glyvursnesi, so tað kann vera liðugt um 1 ár.
   Mett verður, at kostnaðurin fyri projektering verður uml. 0,5 mió.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 12. desember 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kommunala Brennistøðin hevur biðið um undirhondsboð frá J&K Petersen og Articon uppá at gera arbeiðið. Articon átti lægri boðið á kr. 694.300 u/MVG. Við 10% ókendum, 12 % ráðgeving og eftirlit, og 6,25 % MVG kemur arbeiðið í alt at kosta kr. 899.986.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á kommunalu brennistøðini mæla til:

1. At taka av tilboðnum frá Articon áljóðandi kr. 694.300 og játta kr. 0,9 mió. av íløgum fyri 2008 (av karminum til nýtt tyvingarpláss á Glyvursnesi) til verjugarð á rottangaplássinum í Húsahaganum.
2. At játta kr. 0,5 mió. av íløgum fyri 2008 (karminum til nýtt tyrvingarpláss á Glyvursnesi) til at projektera nýtt rottangapláss í grótbrotinum á Glyvursnesi.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 12. februar 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum, býarverkfrøðinginum og leiðaranum á kommunalu brennistøðini og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 28. februar 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Í sambandi við arbeiði at gera projektuppskot til nýtt rottangapláss (goymsluhøll til rottangaevju) á Glyvursnesi, gjørdist greitt, at ein tílík høll gerst rættiliga kostnaðarmikil. Tí avgjørdi byggibólkurin, at steðga á við at projekera høllina, og heldur kanna eftir, hvørjar aðrar loysnir verða nýttar aðrastaðni og sum eisini kunnu nýtast hjá okkum.
Samband varð tikið upp við Simon Moos Maskinfabrik A/S, ið er hevur serkunnleika í at menna og framleiða skipanir til handfaring av evju. Simon Moos skeyt í fyrstu atløgu upp eina skipan, ið nýtir avlopsorku frá Brennistøðini til at turka og hygiejnisera evjuna.
Umboð fyri Brennistøðina og umboð fyri ráðgevafyritøkuna Martin E. Leo hava verið á kunningarferð hjá Simon Moos og hugt nærri eftir hesi skipan, sum er í rakstri á Morsø. Í fyrstu atløgu sýnist ein slík skipan rættiliga áhugaverd, tó at neyðugt er við fleiri kanningum, áðrenn endalig støða kann takast.

Fyrimunir:

- Íløgukostnaður er helst væl lægri enn fyri eina goymsluhøll
- Óneyðugt við plássi í Húsahaganum/Glyvursnesi til rottangaevjuviðgerð.
- Rottangabilarnir sleppa undan at koyra niðan í Húsahaga/Glyvursnes at tøma. Hetta sparir tíð eins og spilltíð vegna kava og frost minkar.
- Lidna produktið (turkaða evjan) er nýtiligt til taðing, í mun til tað produktið, ið fæst við núverandi skipan, ið framvegis ikki er annað enn trupult burturkast, ið eingin vil vita av.
- Ókeypis orka fæst frá Brennistøðini til turking.
- Nytta fæst úr orkuni á Brennistøðini, sum annars verður køld burtur í konditioneringstorninum í filtrinum, harvið økist samlaða nyttustigið av orkuni úr burturkastinum.
- Ein trupulleiki við rakstrinum av roykreinsifiltrinum á Brennistøðini, ið kemst av at roykhitin aftaná ketilin og inn til filtrið er ov høgur, kann verða

loystur við at taka orkuna til turkingina út millum ketilin og filtrið, og harvið køla um roykhitan til filtrið.
- Lidna produktið fyllir munandi minni enn við núverandi skipan, harvið minkar arbeiðið við at handfara lidna produktið eftirfylgjandi eins og plásstørvur til útleggin gerst minni.

Vansar:
- Arbeiðsorka skal til at reka og viðlíkahalda eitt tílíkt annlegg, og tí verður helst neyðugt at seta eitt fólk (handverkara) burturav til tað.
- Skipanin krevur elorku til at flyta evjuna fram gjøgnum skipanina
- Útreiðslur verða til eykalutir.
- Móttøkuumstøður til rottangaevju mugu gerast við síðuna av Brennistøðini á Hjalla (inni á økinum). Her verður hugsað um atkomuveg, móttøkuhøll, goymslutanga og vaskipláss.

Synergieffektir:
Tað at hava eitt slíkt turkiannlegg í samband við eina Brennistøð, ið hevur avlopsorku, gevur fleiri einastandandi møguleikar, fyri at fáa ein skilagóðan rakstur av annleggunum báðum. Nevnast kann:

- Luftin, ið hevur verið gjøgnum turkiannleggið (og sum luktar), kann nýtast sum forbrenningsluft til ovnin, harvið slepst undan at reinsa hesa luft, sum annars er rættiliga kostnaðarmikið (eins dýrt og turkiannleggið).
- Starvsfólk, ið verða sett til at passa eitt slíkt annlegg, kann nýtast til aðrar arbeiðsuppgávur á Brennistøðini, og eisini luttaka í vaktarskipan, tá serligur tørvur er vegna sjúku, summarfrítíð o.t.
- Eitt tílíkt annlegg skal koyra alt samdøgrið, eins og Brennistøðin eisini er mannað alt samdøgrið, og tí er fólk tøkt til at passa tað aftaná vanliga arbeiðstíð.

Avtalað er við Simon Moos Maskinfabrik A/S, at tey senda Tórshavnar kommunu eitt upplegg og eina kostnaðarmeting av eini slíkari skipan síðst í viku 44.

Á fundininum í heilsu og umhvørvisnevndini verður tøka tilfarið um skipanina lagt fram.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin, og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til:

1. At góðkenna, at arbeitt verður víðari við umrøddu loysn við at turka evjuna í staðin fyri at byggja eina goymsluhøll á Glyvursnesi.
2. At játta 3,6 mió., ið er eftir av íløgukarminum til renovatión í 2008, til hesa ætlan, tó so, at endaligt projekt verður at leggja fyri nevndina aftur, áðrenn nakað arbeiði kann fara í gongd.
3. At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndini við atliti at játtanunum (pkt. 2 og 3).

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 4. november 2008:** Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá býarverkfrøðinginum og leiðaranum á Kommunalu Brennistøðini.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin og tekniski stjórin leggja fram uppskot til fígging.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 4. november 2008:** Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá býarverkfrøðinginum og leiðaranum á Kommunalu Brennistøðini.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin og tekniski stjórin leggja fram uppskot til fígging. Samlaða verkætlanin, íroknað bygning, varmavekslara o.a. er mett til kr. 7,0 mió. Tá er roknað við keyp av brúktum anleggi til turkiprosessina fyri uml. hálvan prís. Sum nú er lúkur kommunan ikki krøvini í umhvørvislóggávuni um árliga rottangatøming. Klárgering av móttøkuni er mett at takað uml. 8-9 mánaðir.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og tekniski stjórin mæla til:

1. At taka undir við pkt. 1 og 3 í samtyktini hjá heilsu- og umhvørvisnevndini 4. nov. 2008.
2. At taka undir við at flyta avlopspening av prosjektunum 1015-90-15013 Tyrvingarpláss útbygging og 1015-90-15015 Verjugarður rottangapláss, tilsamans kr. 1.060.860, til prosjekt nr. 1015-90-15015 Nýtt rottangapláss, at leggja afturat verandi saldo á kr. 440.136,-. Víst verður til skjal 2007-1213/25.
3. At játtað kr. 5.500.000,- av íløgum fyri 2009 til verkætlanina. Víst verður til skjal 2007-1213/25.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Eisini samtykt at broyta íløguætlanina í fíggjarætlanini fyri 2009 samsvarandi.

**Býráðið 27. november 2008:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

**Ískoyti:**
Kommunala brennistøðin hevur heitt á Rambøll um at kanna, hvørt tað er gjørligt at nýta avlopsorku frá Brennistøðini til at turka rottangaevju í umrøddu skipan frá Simon Moos. Kanningin er nú liðug, og niðurstøðan er, at tað ikki er gjørligt at

turka rottangaevnuna í umrøddu skipan. Sostatt er greitt, at tað ikki er grundarlag fyri at arbeiða víðari við hesi loysnini.

**Tilmæli:**
Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mælir til, at

1. Vent verður aftur til upprunaligu ætlanina um at byggja rottangapláss í grótbrotinum á Glyvursnesi.
2. Umsitingin letur gera projektuppskot hesum viðvíkjandi, innanfyri tann á býráðsfundi hin 27. november 2008 játtaða fíggjarkarmin, ið sostatt stendur við.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 28. apríl 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Í.s.v. at ábøtur skulu gerast á jarnplássið fyri at lúka treytir í umhvørvisgóðkenningini, er neyðugt at umraðfesta íløgurnar á renovatiónsøkinum.
Verkætlanirnar Tyrvingarplássið og rottangaøkið verða skipaðar undir somu verkætlan "Tyrvingarpláss á Glyvursnesi", sum verður býtt upp í byggistig, ið eru:

- Kloakk út á sjógv
- Rottangaøkið
- Tyrvingarøkið
- Avgrevstrarøkið

Bygginevndin, ið er vald fyri tyrvingarplássið, skal sostatt vera bygginevnd fyri øll byggistig í verkætlanini "Tyrvingarpláss á Glyvursnesi".
Játtanin til tyrvingarplássið og rottangaøkið verður ein samlað játtan, har ið bygginevndin kann áseta býtið millum byggistig og flyta ímillum byggistigini samsvarandi tørvi og raðfesting.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á heilsu- og umhvørvisdeildini og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til, at

- Skipa verkætlanirnar Tyrvingarpláss og rottangapláss sambært omanfyristandandi lýsing, t.v.s. í eina verkætlan við fleiri byggistigum.
- Bygginevndin, ið er vald fyri tyrvingarplássið, verður bygginevnd fyri alla verkætlanina við tilhoyrandi byggistigum
- At tað sum eftir er av játtanini til nýtt tyrvingarpláss og til nýtt rottangapláss, eftir at játtanin til jarnpláss á 3.700.000 er tikin av (BÝR 17/9-2009, mál 2009-1888) verður savnað í eina samlaða játtan til "Tyrvingarplássið á Glyvursnesi". Játtaninirnar eru sostatt:

| Projekt | Játtan | Nýtsla (pr. 1/10-2009) | Avlop (pr. 1/10-2009) |
|---|---|---|---|
| Nýtt | 826.000 | 68.122 | 757.878 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| tyrvingarpláss | | | |
| Nýtt rottangapláss | 6.847.921 | 78.982 | 6.768.939 |
| - Jarnpláss | -3.700.000 | 0 | -3.700.000 |
| **Tøk játtan** | **3.973.921** | **147.104** | **3.826.817** |

- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og Umhvørvisnevndin 6. oktober 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 5. november 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**220/09** **2009-0276**

**Umval av 2 limum í nevndina hjá dagstovninum á Argjum**

Sambært reglugerðini fyri stovnin velur kommunan 3 limir fyri sítt valskeið.

**Býráðið 29. januar 2009:** Jens M. Poulsen, Ingibjørg Berg og Jóhan E. Simonsen.

**Ískoyti:**
Áheitan frá Jens M. Poulsen og Ingibjørg Berg um at velja annað umboð fyri seg í nevndina.

**Býráðið 5. november 2009:** Valdar vórðu Katrin Petersen og Tina Johannesen.

**221/09** **2009-0273**

**Umval av 4 limum í nevndina fyri frítíðarstovuna í KFUM.**

Sambært reglugerðini fyri frítíðarstovuna skal býráðið velja 4 limir fyri sítt valskeið, herav 2 eftir tilmæli frá KFUM.

**Býráðið 29. januar 2009:** Valdar vóru Charla Rasmussen og Ingibjørg Hendriksdóttir.

**Ískoyti:**
Áheitan frá Charlu Rasmussen um at velja annað umboð fyri seg í nevndina.

**Býráðið 5. november 2009:** Valdur varð Bjarni Beder.

222/09 **2009-2819**

**Val av býráðslimi í bygginevndina Røktarheimið Yviri við Strond sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 5. november 2009:** Vald vórðu Halla Samuelsen og Vagnur Johannesen.

223/09 **2009-0624**

**Útbjóðing av bussleiðini**

**Býráðið 5. november 2009:** Tikið av skrá.

**FUNDUR LOKIN KL. 19:50**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| | **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**5. november 2009** | Blað nr.: **8184**<br>Formansins merki: |

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Rúni M. Djurhuus |
| Annfinn Brekkstein | Inga Dahl | Levi Mørk |
| Maria Hammer Olsen | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |